# B36 riggar til

**Mánadagin varð nýtt venjarapar sett, og tó at sáttmálar enn ikki eru komnir upp á pláss, so ljóða tað úr fleiri heraldshornum, at nýggj nøvn eru ávegis til felagið**

B36-VENJARIN
*Jákup Mørk*




*Sum vit áður hava skrivað, so verður tað Jóannes Jakobsen, ið skal venja B36 komandi árið. Undirskriftin varð sett á sáttálan mánadagin, tá tað eisini varð avdúkað, at Magni Mohr verður fysiskur venjari hjá felagnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað er longu nakað síðani, at vit á hesum síðum skrivaðu, at tað allar helst skuldi verða Jóannes Jakobsen, sum skuldi venja besta mansliðið hjá B36 komandi kappingarár.

Á tíðindafundi mánamorgunin var hetta eisini staðfest, og umframt høvuðsvenjarar, so kundi B36 eisini boða frá, hvør skal hjálpa nýggja venjaranum í starvinum.

## Fysisk servenjing

Tað verður vágbingurin, Magni Mohr, sum fer at røkja hendan setningin, og tað verður so fyrstu ferð, at hann soleiðis skal vera við til at standa fyri einum liði í bestu føroysku deildini.

Nakar óroyndur maður er Magni kortini ikki. Seinastu árini hevur hann nomið sær útbúgving innan ítróttarfysiologi, og millum annað hevur hann verið við til at gjørt royndir við donskum landsliðsleikarum og stjørnunum hjá Juventus.

Nú er 30 ára gamli vágbingurin tó fluttur heim aftur á klettarnar, og her verður B36 so fyrsta felagið, sum kemur at fáa royndir av dygdum hansara. So er bara spurningurin, hvussu hetta fer at tørna út, men í B36 dylja tey ikki fyri, at tey við hesum rokna við at hava fingið eitt stórt aktiv, sum bæði kann virka til at halda leikarunum á toppinum og ikki minst sum ein aktivur liður í royndunum at fyribyrgja skaðum.

## Nógv tilgongd

Og einki er at ivast í, at tey í B36 eisini ætla sær at vera við frammi í oddinum komandi kappingarár. Her glapp tað sum kunnugt í fjør, tá HB annað árið á rað streyk avstað við gullinum, men tað tykist tó víst, at nógv verður lagt fyri komandi ár.

Tá spurt verður um møguligan styrk, vilja hvørki nýggi venjarin ella formaðurin í felagnum seta nøvn á nakra tilgongd, men at døma eftir tosinum kring felagið, so er lítið at ivast í, at talan aftur verður um ein av sterkastu hópunum í landinum.

Vit hava áður skrivað, at Arnbjørn Danielsen og Jóhannis Joensen uttan iva fara at spæla við felagnum, men hartil tykjast fleiri onnur væl kend føroysk fótbóltsnøvn vera ávegis.

Sosialurin veit frá álítandi keldum, at Ronnie Samuelsen nú aftur verður at síggja í B36, eftir at hann í hálvt triðja ár hevur verið á heimabeiti hjá EB/Streymi, og miðvøllurin fer sum skilst eisini at fáa tilgongd av Jens Erik Rasmussen.

Í álopinum skal nýggjur makkari finnast til John Petersen, nú Jákup á Borg hevur skift til HB, og nógv bendir á, at tað her verður talan um toppskjúttan frá í fjør, Hjalgrím Elttør, sum ikki fekk dreymin um yrkisfótbólt uppfyltan í Esbjerg.

So hvussu er og ikki, so tykist tað í øllum førum vera víst, at tey í syðra endanum av Gudnadali ikki ætla at binda frið, hóast grannarnir fyri norðan halda rundan føðingardag komandi árið.

StÍF-VB 21-36 (12-21):

# VB staðfestir veruleikan

**Nú tær aftur eru fullmannaðar tykjast VB kvinnurnar ætla at vísa øllum landinum, at tær skulu roknast sum sterkasta liðið í landinum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Kviku vongspælararnir hjá VB høvdu góðar sømdir á Strondum, har StÍF ongan tíð kom fyri seg*

Síðani útlendingamálið við fundinum millum Haarder og Hoydal fekk eina fyribilsloysn, hevur VB ikki verið at steðgað.

Seinasta vikuskifti settu tær VÍF so dyggiliga upp á pláss, og hesaferð var túrurin so komin til StÍF. Kanska hevði VB eisini nakað at prógva her, tí júst StÍF var fyrsta liðið, sum sum fekk fyrimun av málinum. Ikki soleiðis at skilja, at StÍF hevði nakað við hetta at gera, og heldur ikki fyri at undirgrava avrikið hjá StÍF í Vági fyrr í heyst. Men tað er einki at ivast í, at hevði VB verið fullmannað í teirri uppgerðini, so hevði tað í øllum førum verið munandi truplari hjá StÍF ta ferðina.

Tað úrslitið stendur tó ikki til at vika, og kanska júst tí hevði VB alla orsøk til at seta alt upp á pláss, nú liðini hittust á Skála. Og í øllum førum legði VB fyri sum eitt óløgi. Áðrenn tær á heimaliðnum rættiliga høvdu funnið nakað sum helst fótafesti á vøllinum, var VB longu fokið avstað, og tær helmaðu ikki í, fyrr enn sigurin var teimum púrasta vísur.

Og við hesum tók VB oddasessin aftur, eftir at Stjørnan hevði havt hann til láns í eitt samdøgur. Enn hevur VB tó ein dyst til góðar, so einki er avgjørt enn í so máta, og seinni dysturin millum tey bæði liðini í grundspælinum liggur eisini á. Tann uppgerðin verður í Vági nú komandi vikuskifti, so einki er at ivast í, at vágbingar tá enn einaferð fara at síggja eitt topp-tendrað lið fara inn á vøllin.

### Dysturin tølum

**StÍF-VB 21-36 (12-21)**
Málskjúttar
StÍF: Milica Ergic 6, Poula D. Olsen 5, Beinta Joensen 4, Paula B. Høgnesen 2, Sunfríð B. Jacobsen 2(1), Anna Maria Berthelsen 1, Anna B. Danielsen 1
VB: Aukse Vysniaskaite 11(1), Daiva Toumaite 10(3), Rannvá Augustinussen 5, Gurið Mortensen 5, Laila Jespersen 3, Margreth Augustinussen 1, Eyðbritt Krosslá 1
Brotskøst: StÍF 2, VB 7
Útvísingar: StÍF 4
Dómarar úr Tjaldur: Trygvi Mortensen & Kári Hansen.



StÍF-H71 23-13 (12-6):

# Tamir hoyvíkingar

**Meistararnir av Strondum fingu ikki stórvegis av mótstøðu frá gestunum úr Hoyvík**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Uttan stórvegis trupulleikar helt StÍF fast um sína støðu á stigatalvuni, tá teir sunnudagin tóku ímóti hoyvíkingum.

Tað var einki at ivast í, at heimaliðið átti favorittleiklutin í dystinum, og frá fyrsta bríksli tóktust teir eisini at taka hendan á seg. Hoyvíkingarnir fingu valla fótin fyri seg, og tó at vertirnir kanska kundu havt meira ferð á álopsspælinum, so tóktist tað ikki vera neyðugt at koyra kol á allar ketlarnar.

At hoyvíkingar bara fingu seks mál fyrra hálvleikinum sigur nakað nógv um, hvussu trupult teir høvdu við at fáa glið á álopsspælið, og tá StÍF so leyp avstað beint eftir steðgin, tóktist eitt veruligt sorl at hanga í luftini. Heilt so galið gjørdist tað tó ikki, tí hóast úrslitið sýnir ein greiðan mun, so kundi støðan enntá veri verri hjá H71.

Og uttan at teir soleiðis ómakaðu sær nakað serligt, so hildu strandingar á hendan hátt fast um sessin á stigatalvuni. At Neistin so samstundis snávaði móti KÍF, mundi ikki gera dagin verri fyri teirra viðkomandi. Tað úrslitið kann kanska eisini vera ein áminning til StÍF, tí júst KÍF er næsta mótstøðulið teirra.

Hovyíkingar fingu sum so ikki gjørt stórt hesaferð, og aftasti sessurin á stigatalvuni avspeglar eisini avrikið, sum liðið hevur sýnt seinastu dystirnar. Hvørt hetta verður betra komandi dystirnar, er ilt at meta um, men í øllum førum er talan ikki um nakra lætta uppgávu komandi dystin. Tá vitjar H71 nevnliga í Vestmanna, har heimaáskoðararnir neyvan eru nøgdir, bara talan er um sigur. So hoyvíkingarnir eru helst ávaraðir um, at talan tá kann gerast um rættiligt ódnarveður.

### Dysturin í tølum

**StÍF-H71 23-13 (12-6)**
Málskjúttar
StÍF: Artur Johansen 7, Alexandur Johansen 5(2), Sverri Justinussen 4, Andre F. Danielsen 3, Sveinur Justinussen 2, Mortan Hansen 1, Bent Djurhuus 1
H71: Heini Bendtsen 3, Niels Viggo Niclasen 3, Olaf Vestergaard 2, Jákup á Borg 2, Halgir Dahl Olesen 1, Tróndur Vatnhamar 1, Henrik Gerster 1(1)
Brotskøst: StÍF 2, H71 5
Útvísingar: StÍF 4, H71 3
Dómarar úr Tjaldur: Trygvi Mortensen & Kári Hansen



*Artur Johansen var toppskjútti, tá StÍF uttan stórvegis trupulleikar tók sær av H71*

KÍF-Neistin 31-30 (17-14):

# Neistin fall í veitina

**Neistamenn máttu sunnudagin ásanna, hvussu trupult tað er at venda, tá tað fyrst gongur skeiva vegin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Petur Martin Poulsen var væl koyrandi, tá Neistin vitjaði sunnudagin, og saman við væl stríðandi liðfeløgunum eydnaðist honum og liðfeløgunum at geva Neistanum ein frammaná*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Eingin ivi er um, hvør stóra sensatiónin í hondbóltinum var hetta vikuskiftið. Eingin ivaðist undan dystinum í Hovyík í, at Neistin var risafavorittur at vinna. Ikki minst, tá tunga gongdin hjá kollfirðingum seinastu vikurnar verður havt í huga.

Kanska var tað eisini júst hetta, sum Neistin hevði í huganum, tá farið var inn á vøllin sunnudagin, men um so var, so komu teir skjótt á aðrar tankar.

Tí hóast KÍF hevur havt tað trupult seinastu nógvu vikurnar, og hóast teir hava stórar trupulleikar við at gera mál, so løgdu teir bragdliga fyri. Kanska hevði Neistin roknað við, at talan mest sum var um upphiting undan grannauppgerðini móti Kyndli mikudagin, men eftir fyrstu tíggju minuttirnar stóð 8-3 á talvuni, og so var at taka annað skinn um bak.

## Trupult at venda

Men eins og so nógv undan teimum, so mátti Neistin sanna, at tað er trupult at venda gongdini, um tað fyrst gongur skeiva vegin. Fyrst og fremst høvdu kollfriðingar við góðu byrjanini fingið trúnna uppá, at tað skuldi bera til at basa mótstøðuni, og hendan møguleikan ætlaðu teir ikki at geva frá sær.

Við einum væl leikandi Óla Christian Durhuus í málinum megnaðu teir eisini í nógvum førum at leggja forðingar fyri Neistanum, og fram eftir málinum megnaðu teir alla tíðina at skjóta mál.

Seinna umfarið var annars fleiri ferðir um reppi, at dysturin koppaði yvir aftur til Neistan, men tó at teir komu upp á javnleikin nakrar ferðir, so megnaði KÍF hvørja ferð at svara aftur. Seinastu løtuna stóð annars heilt nógv á, tá Neistin fyrst vann eina trý mála leiðslu aftur, og síðani tvær ferðir javnaði nýggja KÍF-leiðslu. Men heimaliðið fekk framvegis seinasta orðið, og so var rómurin stórur á heimaáskoðarunum. Teirra lið hevði enn einaferð víst, at hóast gongdin til tíðir kann tykjast tung, so kunnu teir standa seg millum tey bestu. Og við sigrinum sluppu tey eisini av botnsessinum. Kanska eru útlitini fyri at koma longu upp á talvuna ikki so bjørt í løtuni, men eitt ella tvey úrslit afturat av hesum slagnum, kann broyta heilt nógv í so máta.

Hjá Neistanum var lagið hinvegin einki serligt. Teir eru framvegis á næst fremsta sessinum á stigatalvuni, men tapið hesaferð var absolutt ikki í samsvar við roknistykkið, og nú liggur eyka trýst á teimum undan grannauppgerðini mikudagin. Vinnur Kyndil tann dystin, so verða trý stig á muni frá fyrsta umfarinum av endaspælinum, og tað er í øllum førum trý fleiri, enn í Neistanum høvdu ætlað sær.

### Dysturin í tølum

**KÍF-Neistin 31-30 (17-14)**
Málskjúttar
KÍF: Petur Martin Poulsen 10, Regin Petersen 6, Vagnur Johannesen 6(1), Gert Hansen 5, Teitur Joensen 3, Mirko Milenkovic 1(1)
Neistin: Áki Mørk 10(5), Dragisa Stojovic 7, Blagoje Buha 4, Helgi Justinnussen 4, Ragnar Stakksund 2, Finnur H. Petersen 1, Helgi Michelsen 1
Brotskøst: KÍF 3, Neistin 8
Útvísingar: KÍF 4, Neistin 1
Dómarar úr Kyndli: Geir Wardum & Gunnar Gregoriussen